## Viðmerking:



# Uppsøgnin av tveimum fysioterapeutum á Suðuroyar Sjúkrahúsi er nú veruleiki

Tað vil siga, at nú er avgjørt at niðurleggja ta ambulantu viðgerðina í fysioterapiini á Suðuroyar Sjúkrahúsið.

Tað, ið ger, at vit meta tað neyðugt at gera vart við avleiðingarnar, er ikki bert, at tveir góðir arbeiðsfelagar verða sagdir úr starvi, men í størri mun, at í almenna kjakinum er ikki nóg stórur dentur lagdur á avleiðingarnar, ið uppsagnirnar hava á fólkini, ið búgva í Suðuroynni.

Í fysioterapiini á Suðuroyar Sjúkrahúsi er arbeiðið býtt í tríggjar høvuðsbólkar:

1. Viðgerð av innløgdum sjúklingum á sjúklingadeildini.

2. Viðgerð og viðlíkahaldsvenjing á Ellis-& Røk-tarheiminum.

3. Ambulantar viðgerðir.

Beinleiðis avleiðingin av uppsagnunum er, at ambulanta viðgerðin steðgar. Hetta er ikki ein tóm hóttan, men einasti hugsandi møguleiki, um teir eftirverandi fysioterapeutarnir skulu gera sítt arbeiðið við røttu dygdini. Tað er óhugsandi at skerja viðgerðina á sjúklingadeildini og ellis-& røktarheiminum, um ætlanin er at tryggja førleikan hjá teimum innløgdu og lívsvirðið hjá teimum gomlu. Tað snýr seg um arbeiðsuppgávur, ið ikki kunnu skerjast, um sjúklingadeildin og ellisheimið skulu varðveitast.

Ambulantu viðgerðirnar eru m.a. uppvenjing/viðgerð av sjúklingum, ið eru útskrivaðir av sjúklingadeildini, t.d. fólk við brotið á ørmum og beinum ella fólk við lammilsi eftir blóðtøpp í heilanum.

Somuleiðis sjúklingar við ávísing frá kommunulækna við atliti til uppvenjing/afturvenjing, oftast orsakað av gikt, kropsligum brekið, sjúkraskriving vegna hald í rygginum ella høvuðpínu, eins og børn við rørslu trupulleikum.

Kommunulæknin ávísir sjúklingar til fysioterapi á sjúkrahúsinum, av tí at tað rætt og slætt ikki er orka hjá teimum báðum privatu fysioterapistovnunum í oynni. Sum lógin er nú, er forðan sett fyri, at fleiri stovnar verða her.

Sjálvandi verða eisini ávisingar gjørdar tí sjúkrahúsið hevur hentleikar sum heittvatnshyl og vælútgjørda venjingarhøll, ið er sera væl egnað til hesar sjúklingarbólkar.

Hvussu nógvar sjúklingar er so talan um? Í 1999 var talan um 263 sjúklingar. Væntast kann, at áðrenn jól í ár kemur hetta at raka minst 100 sjúklingar. Tá er fyrivarni tikið fyri at helvtin av árinum er gingið, og privatu stovnarnir taka sær av nøkrum av teimum írestandi sjúklingunum.

So spurningurin er einfaldur: Tá hesi fólk ikki kunnu fara á sjúkrahúsið, hvar skulu tey so fara?

**Fysioterapiin á Suðuroyar Sjúkrahúsi.**

# Viðmerking til grein hjá Ragnhild Olsen

*úr Sosialistiskum Ungmanafelag í Sosialinum og Javnaðarflokkin sum heild*

Eg skal vera tann fyrsti at viðganga, at hatta brævið varð skrivað við einum keguligum tónalag. Tað var av tí einføldu orsøk, at brævið varð skrivað í øði fríggjadagin í seinastu viku, beint aftaná at politisku umboðini fyri føroysku afturhaldskreftirnar høvdu lovprísað Nyrup til skíggja, tí at hann ikki virdi Føroyar og føroyafólk tað allarminsta.

**Javnaðarflokkurin skifti kós**

Javnaðarflokkurin hevur eisini síðani valið brúkt tað mesta av sínari orku at viðgera og niðurgera Tjóðveldisflokkin, so tit mugu ikki gerast skøkk, at onnur eisini viðgera tykkara flokk.

Javnaðarflokkurin hevur tey seinastu árini spælt eitt politiskt spæl fyri at tekkjast veljarunum. Flokkurin hevur nevniliga vent frá at vera ein av sjálvstýrisflokkunum í Føroyum til sína gomlu afturhaldssinnaðu sambandshugsjón. Áðrenn seinasta løgtingsval segði flokkurin, seg taka undir við tí sokallaðu "íslendsku loysnini". Eisini segði formaður floksins Jóannes Eidesgaard, beint tá ið samgonguskjalið varð undirskrivað, at hann gott kundi taka undir við fyrstu síðu í samgonguskjalinum. Á hesari síðu stóð millum annað, at *"Føroyar skal skipast sum eitt land við Fullveldi"*. Ja, eg mátti ásanna at Javnaðarflokkurin, var vorðin ein veruligur Sjálvstýrisflokkur, og eg og onnur tjóðveldisfólk høvdu góðar vónir um, at flokkurin fór at taka undir við Fullveldisætlanum samgongunar. Men eg fór tíanverri so dyggiliga skeivur.

Síðani tá er nógv vatn runnið í ánni, og Javnaðarflokkurin hevur skift fullkomuliga kós. Fyrst bara eitt lítið sindur. Í tí bláa faldarinum, søgdu teir, seg nevniliga vilja alt tað sama sum Samgongan, og teir høvdu enntá eina ætlan um at minka blokkin eftir vøkstrinum í føroyska búskapinum. Tað einasta teir ikki vildu, var at taka Fullveldi ella fult ræði á egnum landi (Í móðurmálsorðabókini stendur at orði fullveldi merkir: *"Tað at hava fult ræði á viðurskiftum sínum"*).

Hetta hevur flokkurin so hildi uppá heilt til nú. Men tá ið tað vísir seg, at samgongan hevur tikið ein part av javnaðaruppskotinum við, hvussu blokkurin kann minkast, taka teir heldur ikki undir við tí.

**Edmund hevur rætt**

Tíanverri hevur Javnaðarflokkurin í dag slept so nógvum av sínum Sjálvstýrishugsjónum, at Edmund Joensen helst hevur rætt, tá ið hann sigur, at andstøðan hevur eitt alternativ til Fullveldisætlanina. Tað alternativið er nevniliga ein moderna heimastýrislóg, sum í veruleikanum bara er at spyrja skøvurnar á tí gomlu. So Edmund til rós, tú hevur gjørt eitt gott arbeiði fyri at toga Javnaðarflokkin til tín.

So eg eri samdur, tá tú sigur, at tykkara dirigentur er ótrúliga góður. Hann hevur megnað at fáa ein heilan flokk og Sosialistiskt Ungamannafelag at skifta kós so fullkomuliga.

**Tryggjar Javnaðarflokkurin vælferðina?**

Javnaðarflokkurin sigur seg tryggja vælferðina. Teir tykjast fullkomuliga at hava gloymt 80'ini og kreppuna í 90'inum. Allir flokkar, eisini Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, vóru við at koyra landið á heysin, og endin varð, at alt, sum kundi kallast vælferð í Føroyum, var burtur. Hetta hendi í heimastýrisskipanini ella tí sokallaða "Ríkisfelagsskapinum", sum afturhaldskreftirnar í Føroyum siga tryggjar vælferðina.

Í dag vil Javnaðarflokkurin aftur til valdið at brúka allar pengarnar, sum Karsten nú ansar so væl eftir. Í "Krosskasti" í kvøld segði Jóannes Eidesgaard í ræmasta álvara, at javnaðarflokkurin helt at samgongan gjørdi ov fáar íløgur. Tað sigur hann, hóast búskaparfrøðingar, bæði føroyskir og danskir, mæla til størsta varsemi á fíggjarlógini, tí vandi er fyri, at búskapurin verður ov heitur. Willhelm Johannesen hevði eitt enn og ørari uppskot í Sosialinum fyrr í ár. Hann helt, at 300 milliónir skuldu gevast til skattalættar. Tað er tað, eg kalli "óseriøst".

**Hví svarar Jóannes ikki?**

Tað var eisini stuttligt at síggja í "Krosskastið, hvussu Jóannes Eidesgaard tosaði uttanum allar spurningarnar Tróndur spurdi hann. Hann klárar ikki at svara, hvør skal hava evsta vald (Tað sama sum fullveldi) í Føroyum, danir ella føroyingar? Og hann hevur einki uppskot um skiftistíð, nú hann hevur kolldømt sítt egnað uppskot um at minka blokkin í mun til búskaparvøkstrin.

Eg kann eisini siga tykkum, at eg eri ikki tann einasti, sum havi lagt merkið til tykkara brøðralag við Nyrup. Tað gleðiliga er hent, at eisini onkrir javnaðarmenn hava varnast *"samansvørjingina"*. Eg havi tosa við tveir javnaðarmenn, sum hava skift frá at siga *"nei"* til at siga *"ja"*. Tað hevði verið gott, um Javnaðarflokkurin nú hevði somu støðu eina tíð, so føroyafólk greitt fekk at vita, hvar hann flýtur. Eg eri sjálvur ikki í iva, at flokkurin er ein Sambandsflokkur.

Hetta verður helst seinastu ferð, eg viðgeri Javnaðarflokkin á hesum sinni, tó kann henda, at eg nevni flokkin í onkrum øðrum samanhangi.

At enda ein áheitan á allar sjálvstýrissinnaðar javnaðarveljarar. Tað verður ikki við Javnaðarflokkinum at vit koma longri á sjálvstýrisleið heldur tvørturímóti. Um tit ætla at fáa einar frælsar Føroyar, gera tit tað best við at stuðla Samgonguni í hennara fullveldisætlan.

Í hjørtum okkara býr frælsið.

**23. mars 2000**
**Rói Joensen**
**limur í Unga Tjóðveldinum**

## Minningarorð til
# Súsannu Hansen
f. 06.08.1980 – d. 09.03.2000

Tungt var at ferðast heim til Føroyar, eftir at hava fingið boðini um at tú ikki longur vart okkara millum. Hetta var so óveruligt og vónleyst, – ja mest sum ein marra, har man bert vil vakna aftur til dagligdagin, men so skuldi ikki verða – tí hetta var veruleikin.

Bert 19 ár fingu vit saman við tær, Súsanna, men hesi 19 árini náddi tú nógv, tí góð hevði tú evnini til tað bókliga, samstundis sum tú hevði fólkaeydnu og hevði eina róliga atferð. Hetta viðførdi at fólk hildu nógv av tær.

Súsanna, tú vakti ómetaliga stóra gleði í familjuni, eftir at foreldur tíni høvdu verið einsamøll í 12 ár og ikki væntaðu at fáa nakað barn. Tú komst sum ein sólstrála, ja var tað barnið, ið so leingi var bíðað eftir. Tú bleivst okkara einasta systkinabarn av Tvøroyri. Hvørt summar av okkara barnaárum, vóru vit øll systkinabørn við foreldrum og ferðaðust í Leirvík hjá ommu. Eg minnist hesar feriur sum eina glaða tíð – vit spældu inni í stovuni, runnu runt um húsini, vóru á seiðabergi og spældu í fjørini. Og so allar føðingardagarnar vit hildu fyri tær í august mánaði. Øll hesi minni eru rík at kunna líta aftur á. Nú tá familjan aftur fer at hittast, vil tað altíð vera ein, ið manglar, men Súsanna tú vilt altíð vera við okkum – í hjørtum okkara.

Altíð hevði tú nógvar ætlanir við lívinum – vildi nú eftir prófvtøkuna flyta niður til okkara og taka lut í tí ríka studentalívinum her í Danmark, men so bleiv ikki. Hetta mugu vit royna at góðtaka, sjálvt um tað kann vera torført.

Her til seinast vil eg sitera 2 ørindir úr einum donskum sangi, sum bleiv skrivaður til eina gentu, ið doyði á ungum aldri.

»Som et lyn – blir det pludselig alvor
og så sker det – man ikke troede ku' ske
man prøver først at lade som om,
at det onde ikke findes
og spejler mod et håb –
som man kan klynge sig til.

Det er så let – at sige: Bare kom videre
og at der er en mening – både i liv og død
men der er ingen større sorg
end at miste dem, man elsker
først når de er væk, forstår man helt –
hvor meget de betød«

Súsanna góða, við hesum orðum vilja vit øll systkinabørnini siga takk fyri alt og – góða ferð heim. Hvíl í friði.

**Sigrun**




## Skrivstovustarv

Føroya Shell søkir starvsfólk til bókhaldið á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Ábyrgd av ognarabókhaldinum
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Kunna avloysa við EDV-skipanina
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

**Vit vænta at tú hevur:**
- Útbúgving og royndir innan skrivstovuyrkið
- Royndir innan ognarabókhald
- Hollan kunnleika til EDV og at tær dámar at samskifta við onnur.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við avbjóðingum
- Møguleikar fyri útbúgving og persónligari menning
- Góða løn í samsvar við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á telefon 34 74 00 lokal 213.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum kann sendast til P/F Føroya Shell, Postbox 188, 110 Tórshavn og má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. mars 2000.

**Shell**






Sosialurin - 311820

**Bindoplast.Veggjamáling uttan upploysingarevni**

Bindoplast er einasta veggjamáling her heima, sum er 100% uttan upploysingarevni uttan mun til lit.
Tí hevur Bindoplast eisini fingið Umhvørvisblómuna frá ES og viðmæli frá Astma- och Allergi Förbundet i Svøríki




T.d. Bindoplast 20
**÷20%**
Fyrr 569,-
**NÚ 455,-**

**Profa**

**Á Hálsi, Tórshavn**
Tel. 31 92 20

**Tvøroyri**
Tel. 37 10 81



TT

*Fartelefonir*

Tøldu Tænastan www.tt.fo

Staravegur 5 - Postsmoga 1144 - FO-110 Tórshavn - Tlf.: 317620 - Fax: 317699



## Maskinmeistari søkist til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari á Sundsverkinum er leyst at søkja.

Við tað at Sundsverkið er í rakstri alt samdøgrið alt árið krevur starvið, at viðkomandi er til reiðar bæði at átaka sær alt vanligt dagligt viðlíkahaldsarbeiði í samstarvi við manningina á Sundsverkinum annars, og eisini at luttaka sum hjálparmaður (2. maður) á vakt uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Tað er ikki eitt krav, at viðkomandi hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, men kundu vit hugsað okkum, at umsøkjararnir hava í minsta lagi tvey ára maskinmeistaraskúlaprógv ella javnbjóðis førleika. Eisini geva royndir innan maskinmeistarayrkið fyrimun. Umsøkjarar við fullari maskinmeistaraútbúgving verða tiknir fram um aðrar umsøkjarar.

Lønin verður sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið í 3. lønarflokki.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Osvald Hansen, verksmeistara á Sundsverkinum ella til Bjarka Hermansen ella John P. Danielsen á skrivstovu okkara í Havn, telefon 311366.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 12. apríl 2000.

**Tórshavn, tann 22. mars 2000**

**Elfelagið**
**SEV**



## Eksklusiv skrivstovuhølir

í fantastiskum natúrumhvørvi í Havn til leigu frá 1. juni 2000.

2 leigumál á 80 m$^2$
ella
1 leigumál á 160 m$^2$.

**Bill.mrk. 59811**



## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



**Norðoya Røktarheim**
**FO-700 Klaksvík**

## Frítíðaravloysarar

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum fyri sjúkrasystrar, sjúkrahjálparar og heilsuatstøðarar frá 01.06.2000 til 30.09.2000.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Løn- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi felag.

Umsókn saman við avriti av prógvi og autorisatión verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 17.04.2000.



## Dagrøktarmamma

Søkt verður eftir dagrøktarmammu at byrja skjótast tilber.

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2000.

**Sandavágs kommuna**
tlf. 333930 & 332470



## Frá Maskinmeistarafelagnum

Ársaðalfundurin verður á Hotel Hafnia leygardagin 25. mars kl. 14.00.

**Stýrið**





stephanssons hús tlf. 314291

## DAGRØKTARAR TIL TÓRSHAVNAR KOMMUNU

Sum dagrøktari í Tórshavnar kommunu fært tú eitt sera sjálvstø›ugt og fjølbroytt starv. Starvi› er væl lønt og krevur ein professionellan hugbur› til barnauppaling. Frá kommununi fært tú fakligan stu›ul, skei›, rá›geving frá økispedagogum, atgongd til spælistovur, fimleikahallir, svimjihyl og bókasavn.

Tórshavnar kommuna
Dagrøktarskrivstovan
Telefon 315160 lokal 223
Kirkjuvegur 1
100 Tórshavn